tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt:Kristin Michelsen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Alvi Mortensen, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen.
Anita Vibergsdóttir hevði givið avboð.
Skrivari:Lasse Jensen (Jónleyg Bech hevði forfall)

**Borgarstjórin spurdi, um har vóru viðmerkingar til skránna.**

Súsanna Bertholdsen hevur sum viðmerking, at meiriluturin hevur biðið um at fáa støðutakan til ognarviðurskiftini í bú-og heimatænastuni á skrá, og er ónøgd við at tað ikki er á skrá.
Kristin Michelsen sigur, at bíðað hevur verið eftir einum betri loysn frá landinum, og tískil er tað ikki sett á skrá.
Bjarni Hammer, nevnir at tað er rætt, at har eru vónir um eina betri loysn, men ynskir kortini at kommunan tekur støðu til um tað skal vera felagsogn.

Kristin Michelsen metir at tað kann skaða tilgongdina í tí dialog sum er við løgmann og landsstýrisfólkini, og vísir á at bæði Klaksvík og Vágur hava sjálvsognarstovnar, sum Suðuroyar BHS hevur arbeitt við í fleiri ár.

Kristin Michelsen vísir á, at málið ongantíð er viðgjørt í nakrari nevnd hjá býráðnum, áðrenn til kemur til beinleiðis til býráðið.

Súsanna Bertholdsen vísir til §20 í kommunustýrislógini, at borgarstjórin deilir mál út til nevndirnar og sjálvur tekur sær av málum ið ikki eru deilt út.

Súsanna Bertholdsen skýtir upp, málið verður sett á skrá, og hevur sum tilmæli, at Tvøroyrar Kommuna tekur undir við tilmælinum sambært innihaldinum í uppritinum frá stýrinum í BHS, sum varð gjøgnumgingið á stýrisfundi í BHS 28. oktober 2016.

Kristina Roest fór av fundinum, og tók ikki lut í viðgerðini av hesum málinum.

Atkvøtt varð um tilmælið, og tað varð einmælt samtykt.

**Borgarstjórin spurdi, um har vóru fleiri viðmerkingar til skránna, og eingin viðmerking var.**



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Skattainntøkur 2019 | 3 |
| 2 | Ókeypis svimjing til borgarar á Tvøroyri | 3 |
| 3 | Umsókn um stuðul í 2019 - Tvøroyrar Bóltfelag | 4 |
| 4 | FSR - bygging av nýggjum neysti | 5 |
| 5 | Nýggj journalskipan til umsitingina | 7 |
| 6 | Ferðaleiðaraskeið í kvøldskúlanum | 8 |
| 7 | Íbúðarbygging Heiðatrøðin 2 - Bústaðir - matr. nr. 208av | 9 |
| 8 | Uppskot um vendipláss á Stígargøtu í Froðba | 10 |
| 9 | Umsókn um keyp av lendi og bygging av bilhús á matr, nr. 1k Tvøroyri | 10 |
| 10 | Ferðgáa á Trongisvágsvegi - Landsverk | 11 |
| 11 | Viðtøkur fyri sjálvsognarstovnin SALT | 11 |
| 12 | Innrætting av bygninginum á matr.nr. 374 í miðbýnum (Posta bygningurin) | 12 |
| 13 | Uppskot um at broyta innrætting av læknamiðstøðini | 13 |
| 14 | Kunnandi fundur um eldraøkið | 14 |
| 15 | Útnorðurskúli í Hvalba | 15 |




Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.20.00-Ø00-1-19**

## 1. Skattainntøkur 2019

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 7. februar 2019, pkt. 1:**
Borgarstjórin kunnar um skattainntøkurnar fyri januar.

### Avgerð

Borgarstjórin kunnaði um skattatølini.

### Skjøl

- Samanbering av skatti 2018-2019.xlsx
- Skattur 2019, januar.pdf

**18.13.00-A00-1-18**

## 2. Ókeypis svimjing til borgarar á Tvøroyri

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 4. februar 2019, pkt. 8:**
Nevndin mælur til, at almenna svimjingin framhaldandi verður ókeypis fyri borgarar á Tvøroyri, ið fáa borgarakort. Mælt verður samstundis til, at kostnaður áljóðandi kr. 20 fyri hvønn verður ásettur fyri brúkarir, ið ikki eru skrásettir í Tvøroyrar Kommunu.

**Fíggjarnevndin, 7. februar 2019, pkt. 7:**
Mælt verður til, at almenna svimjingin framhaldandi verður ókeypis fyri borgarar á Tvøroyri, ið fáa eitt kort at vísa í svimjihøllini. Mælt verður eisini til, at kostnaður áljóðandi kr. 20 fyri hvønn verður ásettur fyri brúkarir, ið ikki eru skrásettir í Tvøroyrar Kommunu.

### Avgerð

Tilmælið frá mentanarnevndini varð einmælt samtykt.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**18.20.00-Ø40-7-18**

## 3. Umsókn um stuðul í 2019 - Tvøroyrar Bóltfelag

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 8. januar 2019, pkt. 5:**
Nevndin ynskir ein fund millum býráðið og nevndina í TB. Málið verður útsett til hesin fundur hevur verið.

**Mentanarnevndin, 4. februar 2019, pkt. 11:**
Nevndin mælir til, at stuðla við somu játtan sum í fjør kr. 300.000,-

Bjarni Hammer mælir til, at umframt hetta verður stuðlað við kr. 30.000,- um mánaðin. Hesin stuðul verður at eftirmeta 3. hvønn mðr ella oftari, um tørvur er á tí.

Anita Vibergsdóttir ynskir viðmerkt, at hon heldur kommunan skal heita á nevndina at gera eina stuðulsinnsavning millum fólk í kommununi.

Nevndin ynskir, at býráðið viðger málið sum afturlatið mál.

**Fíggjarnevndin, 7. februar 2019, pkt. 8:**
Borgarstjórin mælir til, at kommunan stuðlar TB við kr. 500.000,- og at stuðulin verður goldin í mánaðarligum gjøldum yvir 10 mánaðir.

Bjarni Hammer mælir til at stuðla við somu játtan sum í fjør kr. 300.000,- Eisini mælir hann til, at umframt hetta verður stuðlað við kr. 30.000,- um mánaðin fram til kappingin í 2019 endar. Hesin stuðul verður at eftirmeta 3. hvønn mðr ella oftari, um tørvur er á tí.

Kristina Roest tekur undir við tilmælinum frá mentanarnevndini at stuðla við somu játtan sum í fjør kr. 300.000,-



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Avgerð**

Atkvøtt varð um tilmælið frá mentanarnevndini.
Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddi fyri.
Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer og Bogi Johannesen atkvøddi ímóti.

Atkvøtt varð um tilmælið frá Kristin Michelsen í fíggjarnevndini.
Kristin Michelsen, Alvi Mortensen atkvøddi fyri.
Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest, Bjarni Hammer og Bogi Johannesen atkvøddi ímóti.

Atkvøtt varð um tilmælið frá Bjarna Hammer úr fíggjarnevndini.
Bjarni Hammer og Bogi Johannesen atkvøddi fyri.
Kristin Michelsen, Alvi Mortensen atkvøddi ímóti.
Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddi ikki.

Málið er fallið.

**18.20.00-G01-1-18**

## 4. FSR - bygging av nýggjum neysti

**Málsfrágreiðing**

**Vinnu- og havnanevnd, 31. januar 2019, pkt. 3:**
Alvi Mortensen mælir til, at lata FSR fara í gongd, og játta kr. 500.000.
Bogi Johannesen mælir til, at málið verður viðgjørt í øðrum nevndum, m.a. í Teknisku nevnd, 4. februar 2019.

Samtykt við tveimum atkvøðum, at beina málið í Teknisku nevnd og í Mentarnarnevndina. Alvi Mortensen atkvøddi ímóti.

**Tekniska nevnd, 4. februar 2019, pkt. 6:**
Bjarni Hammer og Kristina Roest mæla til, at heita á FSR-nevndina um at lata inn fullfíggjaðan roknskap fyri 2017 og 2018. Tvøroyrar Kommuna verður partur av einari byggiætlan.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Í sambandi við fundarfrásøgnini frá 26. nov. 2018, hvar heit verður á býráðið um at taka fund upp við Varðan Pelagic, í samband við nýgerð av kappróðrarneysti, verður heit á borgarstjóranum at fáa fundin í lag.

Alvi Mortensen mælir til, at lata FSR fara í gongd, og játta kr. 500.000.

Atkvøtt var um uppskotið hjá Alva Mortensen, og uppskotið fall við 1 atkvøða fyri og 2 í móti.

Atkvøtt var um uppskotið hjá Bjarna Hammer og Kristina Roest, og uppskotið varð samtykt við 2 atkvøðum fyri. Alvi Mortensen atkvøddi ikki.

**Mentanarnevndin, 4. februar 2019, pkt. 12:**
Mælt verður til, at arbeiðið við projektinum verður skipað á slíkan hátt, at kommunan hevur neyvt eftirlit og stýring við arbeiðnum.

**Fíggjarnevndin, 7. februar 2019, pkt. 9:**
Borgarstjórin mælir til, FSR letur kommununi roknskap fyri 2017 og 2018 og síðan fær kr. 500.000,- til at byrja arbeiðið at byggja nýtt neyst. Hann mælir eisini til, at tekniska deild og/ella fíggjarumsitingin hjá kommununi verða umboðaði í einari bygginevnd fyri verkætlanina.

Bjarni Hammer og Kristina Roest taka undir við tilmælunum frá teknisku nevnd og mentanarnevndini. Bjarni Hammer mælir til, at býráðið hevur umboð í bygginevndini fyri verkætlanini.

Bjarni Hammer mælir til, at kommunan verður eigari av hølunum, men at FSR fær fullan ræðisrætt yvir teimum.

## Avgerð

Býráðið hevur umbiðið skjøl frá FSR, sum ikki eru til taks, og tískil verður málið ikki viðgjørt nú.

## Skjøl

- Tvøroyrar Kommuna.docx



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**85.11.06-G01-1-18**

## 5. Nýggj journalskipan til umsitingina

### Málsfrágreiðing

Orsakað av, at Tvøroyrar Kommuna ikki longur sleppur at brúka núverandi journalskipan, SBSYS, er neyðugt at skifta til eina aðra skipan.
Samstundis skulu vit lata eina sonevnda skjalasavnsútgávu inn til Tjóðsavnið.

Umsitingin hevur í 2018 havt samskifti við fleiri veitarar, og við aðrar stovnar í somu støðu.

Fylgjandi skipanir, hava vit umhugsað, men vrakað, orsakað av, at tær ikki í løtuni eru á einum nøktandi støði til okkara endamáli: Nema Journal (Nema) og Northjournal (Nordik-KT).

Vit hava biðið um tilboð uppá fylgjandi skipanir, sum vit meta kunnu lúka krøvini til okkara journalskipan: GetOrganized (netcompany), 360° (Formula), Nova ESDH (KMD).

Fylgjandi tilboð hava vit fingið:

| Skipan | Seljari | [illegible] | | [illegible] |
|---|---|---|---|---|
| [illegible] | [illegible] | | [illegible] | [illegible] |
| [illegible] | [illegible] | | [illegible] | [illegible] |

**Kommunustjórin og KT-samskiparin mæla til, 7. februar 2019, pkt. 12:**
Kommunustjórin og KT-samskiparin mæla til, at taka av tilboðnum frá KMD uppá skipanina Nova ESDH.
Skipanin kann tað hon skal, og KMD (fyrrv. Kommunedata) er ein álítandi veitari, umframt at tilboð er væl lægri og inniheldur meiri enn tað frá Formula.

**Fíggjarnevndin, 7. februar 2019, pkt. 12:**
Mælt verður til at fylgja tilmælinum frá kommunustjóranum og KT-samskiparanum.

### Avgerð

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Skjøl

- tvøroyri - KMD Nova ESDH.pdf
- Tvøroyrar Kommuna Business 360° tilboð 2.0.pdf

**24.05.00-G01-2-18**

## 6. Ferðaleiðaraskeið í kvøldskúlanum

### Samandráttur

Í tráð við samtykta ferðavinnupolitikkin er ætlanin at skipa fyri ferðaleiðaraskeiði undir Tvøroyrar Kvøld- og Ungdómsskúla. Í hesum sambandi er fyrispurningur komin frá COmmIT, um kommunan er sinnað at gjalda luttøkugjaldið fyri luttakarar úr kommununi. Somuleiðis er ætlanin at aðrar kommunur gjalda fyri teirra borgarir. Kostnaðurin fyri hvønn er kr. 5.950,-

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 8. januar 2019, pkt. 7:**
Nevndin mælir til at gjalda kr. 4.000,- fyri hvønn luttakara av Tvøroyri og luttakarirnir gjalda sjálvir tær írestandi kr. 1.950,-

**Fíggjarnevndin, 14. januar 2019, pkt. 8:**
Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum frá mentanarnevndini um, at kommunan betalir kr. 4.000,- fyri hvønn luttakara búsitandi Tvøroyri og luttakarirnir gjalda sjálvir tær írestandi kr. 1.950,-.

Kommunan ynskir at síggja orðingina í lýsingini, áðrenn hon fer út.

### Avgerð

Tilmælið frá fíggjarnevndini einmælt samtykt.

### Skjøl

- Ferðaleiðaraskeið - Suðuroy.pdf

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**16.15.00-I06-1-12**

## 7. Íbúðarbygging Heiðatrøðin 2 - Bústaðir - matr. nr. 208av

### Málsfrágreiðing

**Tekniska deild mælir til, 4. februar 2019, pkt. 1:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri, og Jónleyg Bech, kommunustjóri, vitjaðu nevndina, og kunnaði um málið viðv. samskiftinum við Bústøðum í sambandi við íbúðarbygging í Heiðatrøðini.

Bústaðir ynskir, at fáa longt freistina í ognarbrævinum frá 2013, ið var, at har skuldi byggjast innan 2 ár.
Eisini sigur Bústaðir, at fyri hvørja eind ið kommunan ger byggibúgvin, verður endurgoldið kr. 100.000, tá frároknað keypsprísin.
Tvs. verða 11 eindir gjørdar byggibúgvin, verður goldið 1,1 mill. kr., frároknað 250.000 kr.

Borgarstjórin kunnaði um, at Bústaðir kann byrja beinanvegin.

**Tekniska nevnd, 4. februar 2019, pkt. 1:**
Nevndin mælir til, at lata upp fyri 2 ára klausulinum, og at umsitingin arbeiðir skjótt saman við Bústaðir, við atliti til lendisarbeiði.
Umsitingin vendir aftur til nevndina tá okkurt nýtt er í málinum.

### Avgerð

Einmælt samtykt, at lata upp fyri gamla 2 ára klausulinum, og at 2 ára klausul verður galdandi frá d.d..

### Skjøl

- Fwd: Heiðatrøðin 2
- Ognarbræv



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**05.01.00-P20-1-08**

## 8. Uppskot um vendipláss á Stígargøtu í Froðba

### Málsfrágreiðing

**Tekniska nevnd, 6. februar 2017, pkt. 13:**
Tekniska deild ger uppskot til vendipláss.

**Tekniska nevnd, 4. februar 2019, pkt. 4:**
Nevndin mælir til, at gera eitt minni vendipláss á matr. nr. 71b, á uml. 6x6 m omanfyri matr. nr. 76f.

### Avgerð

Kunnað varð um málið.

### Skjøl

- vendipláss_skitsa
- vendipláss 3d mynd

**02.34.02-G01-10-18**

## 9. Umsókn um keyp av lendi og bygging av bilhús á matr, nr. 1k Tvøroyri

### Málsfrágreiðing

**Tekniska nevnd, 21. januar 2019, pkt. 1:**
Nevndin viðmælir, at tey kunnu keypa stykki, við tí treyt at áin verður rætta upp og tey gerða arbeiði sjálvi.
Um kommunan ger arbeiði verður keypsprísurin hægri.

### Avgerð

Kunnað varð um málið.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Skjøl**

- IMG_7127.JPG

**05.13.00-G01-1-18**

## 10. Ferðgáa á Trongisvágsvegi - Landsverk

### Málsfrágreiðing

**Tekniska nevnd, 21. januar 2019, pkt. 2:**
Nevndin mælir til, at skelti verður sett upp vestanfyri hús hjá Hans Rudolf Niclasen (Trongisvágsvegur 192). Verður koyrt í ferðslunevndina.

### Avgerð

Býráðið heitir á Landsverk og Landsferðslunevndina um, at flyta ferðgáan longri vestur, sambært tilmælinum frá Teknisku Nevnd.

### Skjøl

- VS: viðvíkjandi ferðgáa

**20.13.00-I00-1-16**

## 11. Viðtøkur fyri sjálvsognarstovnin SALT

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 4. februar 2019, pkt. 4:**



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Nevndin mælir til at heita á Saltsilogrunnin um at víðka stýrið til 5 limir, harav kommunan og Fíggjarmálaráðið hava hvør sín fasta lim og skiftast um at velja ein lim, vísandi til samskiftið við Saltsilogrunnin um hetta á fundi hin 20.12.2017.

### Avgerð

Atkvøtt varð um tilmælið frá mentarnarnevndini.
Samtykt við 4 atkvøður fyri og tveimum ímóti.
Súsanna Bertholdsen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Kristina Roest atkvøddi fyri.
Kristin Michelsen og Alvi Mortensen atkvøddi ímóti.

**82.05.00-G01-1-19**

## 12. Innrætting av bygninginum á matr.nr. 374 í miðbýnum (Posta bygningurin)

### Samandráttur

Forkvinnan ynskir at umrøða hetta málið á fundinum.

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 4. februar 2019, pkt. 10:**
Mælt verður til at bjóða Svend Højgaard suður at greiða frá, hvussu hann sær bygningin best innrættaðan til bókasavn. Eisini verður mælt til at tosa við CommIT um, hvussu tær síggja eina kunningarstovu inni har. Møguleiki er eisini fyri at biðja Siri Andreasen koma við hugskoti til innrætting. Anita Vibergsdóttir ynskir viðmerkt, at hon heldur tað verður týdningarmikið, at umsitingin er við innyvir hetta.

### Avgerð

Kunnað varð um málið.

**82.18.00-P20-1-18**

## 13. Uppskot um at broyta innrætting av læknamiðstøðini



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Málsfrágreiðing

Starvsfólk á kommunulækna-miðstøðini á Tvøroyri hava leingi havt eitt ynski um at innrætta kommunulækna-hølini av nýggjum soleiðis at betur pláss og skilnaður er millum har sum starvsfólkini arbeiða, bíðirúmið og kaffistovuna/uppihaldsrúmið hjá starvsfólkunum.

Lasse Jensen, tekniskur málsviðgeri, var í fjør heyst á staðnum og skoðaði hølini fyri síðani at gera uppskot til tekning og kostnaðarmeting av einum tílíkum arbeiðið, sí viðfestu skjøl í málinum.

Málið varð aftur viðgjørt í sosialu nevnd tann 28. mars 2018.

**Sosiala nevnd, 27. februar 2018, pkt. 4:**
Nevndin er jaligt sinnað, og semja er um, at arbeitt verður víðari við uppskoti 1.
Fundur má fáast í lag sum skjótast við leiðsluna á Suðuroyar Sjúkrahúsi um umvælingarnar, umframt má fundur eisini fáast í lag við Hvalbiar- og Fámjins kommunur um samfígging.

**Sosiala nevnd, 28. mars 2018, pkt. 3:**
Sosiala nevnd samtykti at mæla fíggjarnevndini og býráðnum til, at tær ábøtur á kommunulæknahølið, sum peningur er settur av til, verða framdar skjótast gjørligt sambært tí tekning, sum Lasse Jensen hevur gjørt.

**Fíggjarnevndin, 4. april 2018, pkt. 7:**
Fíggjarnevndin ynskir, at Ronnie Midjord kemur á fund komandi mánadag 9. apríl umboðandi eigaran av kommunulækna-hølinum. Kommunustjórin fylgir upp við at ringja til Ronnie.

**Býráðið, 9. april 2018, pkt. 3:**
Ronnie Midjord var á fundi við býráðið í dag, og býráðið er samt um at bíða við at fara víðari við málinum til Sirið Stenberg, landsstýriskvinna, kemur á fund við umboð fyri kommunurnar í Suðuroynni. Fundurin verður eftir ætlan 26. apríl 2018.

**Sosiala nevnd, 6. februar 2019, pkt. 2:**
Ynski hevur verið frá læknaskrivarunum um eina lúku í hurðina inn til skrivstovuna. Tosað verður við tey um hetta.

Mælt verður til at byrja arbeiðið við at broyta innrættingina sum skjótast. Arbeiðið má leggjast tilrættis í samráð við starvsfólkini í læknamiðstøðini og tekniska leiðaran á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

## Avgerð



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo
Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Kunnað varð um málið.

### Skjøl

- Skrámynd
- Flatmynd
- Fundarfrágr.0001.pdf
- Kostnaðarmeting_Uppskot3
- Kostnaðarmeting_Uppskot2
- Kostnaðarmeting_Uppskot1

**00.13.00-I00-1-19**

## 14. Kunnandi fundur um eldraøkið

### Samandráttur

Forkvinnan ynskir at umrøða møguleikan at skipa fyri kunnandi borgarsfundi um eldraøkið.

### Málsfrágreiðing

**Sosiala nevnd, 6. februar 2019, pkt. 1:**
Nevndin mælir til, at skipað verður fyri kunnandi fundi um eldraøkið. Uppskot til luttakarir: Leiðarin og stýrisformaðurin í Bú- og Heimatænastuni, borgarstjórin, kommunustjórin og fíggjarleiðarin.

Anita Vibergsdóttir ynskir viðmerkt, at hon kundi hugsað sær at vita, hvussu verður við bygninginum við Sílá fyrst og eisini hvat hendir á økinum eftir, at løgmaður við fylgi hava verið her suðuri.

Súsanna Bertholdsen og Bogi Johannesen eru samd við Anitu Vibergsdóttir viðv. bygninginum við Sílá, men annars halda tey at fundurin kann haldast, tá tað er avgreitt.

### Avgerð

Tilmælið frá Sosiala Nevnd einmælt samtykt.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**17.11.00-I00-1-18**

## 15. Útnorðurskúli í Hvalba

### Málsfrágreiðing

**Býráðið, 29. december 2018, pkt. 5:**
Anita Vibergsdóttir heitir á býráðið um at beina málið í mentanarnevndina til viðgerðar.
Einmælt samtykt at beina málið til mentanarnevndina til viðgerðar á fyrstkomandi fundi.

**Mentanarnevndin, 8. januar 2019, pkt. 11:**
Nevndin mælir til at gjalda Hvalbiar kommunu kr. 270.000,- smb. hjálagda skrivi frá Hvalbiar kommunu dagf. 17.09.2018.

**Fíggjarnevndin, 7. februar 2019, pkt. 3:**
Kannað verður nærri, um talan er um samlaðu upphæddina fyri verkætlanina.

### Avgerð

Uppskotið frá Mentarnarnevndini og Fíggjarnevndini einmælt samtykt.

### Skjøl

- Skriv frá Hvalbiar Kommunu



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin**

**Fundur lokin**

Kristin Michelsen

Bjarni Hammer

Bogi Johannesen

Alvi Mortensen

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið – opin skrá

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 01-2019 |
| Fundardagur | 13. februar 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan